# Fekk sjálvsvirðingina aftur



*Ingun Kjærbo fór ígjøgnum nógv, áðrenn hon fekk uppreisn á Heilsuskúlanum. Nú er hon útbúgvin heilsurøktari*

**Ingun Kjærbo, sum bæði í fólkaskúlanum og á FHS varð lopin um vegna sítt orðblindni, bleiv eitt annað fólk á Heilsuskúlanum í Suðuroy, har hon fekk góða hjálp. Til prógvtøkuna fekk hon 10 í miðal**

Randi Jacobsen

Tá ið 18 heilsuhjálparar í november í fjør tóku prógv á Heilsuskúla Føroya, var ein av næmingunum mest errin av sær sjálvari og sínum prógvi.

Tað var 26 ára gamla Ingun Kjærbo úr Havn.

Fyri fyrstu ferð í lívinum hevði hon vunnið ein stóran sigur, og tað var at taka eina útbúgving og harafrat við góðum úrsliti. Í miðal var prógvtalið 10.

- Í fólkaskúlanum upplivdi eg alt ov ofta, at eg ikki slapp at lesa upp, tí tað tók mær ov langa tíð, og eg varð heldur ikki biðin um at koma upp til talvuna av somu orsøk. Eg varð stutt sagt lopin um, sigur Ingun Kjærbo.

## Lærdi ongantíð enskt

Enskt lærdi hon ongantíð í skúlanum, og tað harmar hana. Lærarin bað hana bara taka bókina við heim og biðja pápan um at lesa við sær.

Lærararnir dugdu at síggja, at nakað varð galið, og hon skuldi tí hava eyka tímar. Hon fekk eyka tímar í føroyskum, men trupulleikin var, at hon varð tikin út úr roknitímunum fyri at læra at lesa føroyskt, og úrslitið varð, at hon hevði vánalig úrslit í øllum lærigreinum, sjálvt um tað eftir sjey árum gekk frægari at lesa.

Aftaná fólkaskúlan fór Ingun Kjærbo á FHS. Hon søkti inn á skúlan í Havn, men slapp ikki inn, tí prógvtølini vóru ov vánalig. Hon slapp so inn á Kambsdali.

- Har fekk eg onga hjálp. Eg minnist, at ein lærari hvørki vildi hava meg at lesa ella skriva, tí eg dugdi so illa. Tað var ræðuligt at uppliva, sigur Ingun Kjærbo.

Úrslitið var hareftir.

## Einki sjálvsálit

Hennara sjálvsvirði var lágt. Hon kendi seg býtta, skammaðist og tordi einki.

Hon ræddist fyri at skula út at arbeiða, men fór kortini í eina kiosk. Ein dag skuldi hon skriva eina rokning á ein blokk, og tá kom ein onnur og skrykti blokkin frá henni við grundgevingini, at hon var orðblind.

Ingun Kjærbo arbeiddi eitt skifti sum heimahjálp og hennara ynski var at læra til heilsuhjálpara.

Hon hættaði sær illa, men hon var greið yvir, at vitinum bagdi einki, tí hon lærdi væl. Tað tók henni bara langa tíð at koma gjøgnum ein tekst, men tað, sum hon las, sat.

## Annað lív

Fyri Ingun var tað sum ein opinbering at koma á Heilsuskúlan.

- Ein lærari segði beinanvegin við okkum, at um onkur okkara var lesi- og skriviveik, skuldu vit bara siga tað, og eg so gjørdi, sigur Ingun.

Hon sigur, at lærarar og næmingar á skúlan bóru hana á lógvum.

- Heilsuskúlin er ein ótrúliga góður skúli og skal hava nógv rós frá mær.

Skúlin hevur bæði útgerð og lærarar, sum hjálpa orðblindum og lesi- og skriviveikum, og hetta kom væl við hjá Ingun.

- Eg var nokkso bangin, tá ið eg skuldi til prógvtøku, men prógvtøkan hjá mær var væl fyriskipað. Eg fekk eina stovu fyri meg sjálva, og tær bjóðaðu sær til at koma at lesa upp fyri mær, um mær tørvaði hjálp, men tað var ikki neyðugt, sigur Ingun, sum fekk eitt óføra gott prógv.

Beinanvegin sum Ingun Kjærbo fekk sítt prógv, fór hon út at arbeiða sum heilsuhjálpari ella heimahjálp. Hon hevur hug at útbúgva seg meira, men tað verður ikki beinan vegin, tí hon hevur hug at arbeiða eina tíð fyrst.

# Eitt stórt framstig

**Tað er einastandandi gott, at landið nú setir pening av til at undirvísa lesi- og skriviveikum, og at kvøldskúlarnir hava orðblindni sum lærigrein, sigur Hans-Pauli Christiansen, leiðari fyri vaksnaundirvísingini í Albertslund**

Randi Jacobsen

Mentamálaráðið, kvøldskúlarnir, miðnámsskúlarnir og vinnuskúlarnir hava av álvara sett trupulleikan við orðblindni á dagsskránna.

18 lærarar hava verið niðri og fingið sær eyka útbúgving, og tað er gjørt í samráð við Hans-Paula Christiansen, sum er leiðari fyri vaksnaundirvísingini í Lund. Hann er eisini formaður í danska felagnum fyri orðblind.

Alt byrjaði við eini stórari ráðstevnu, sum hildin varð á Hotel Føroyum fyri hálvum triðja ári síðan. 200 fólk luttóku, og táverandi løgmaður, Jóannes Eidesgaard setti ráðstevnuna.

Tá ið felagskapurin Lions skuldi taka støðu til, hvørji tiltøk vórðu verd at stuðla, kom ein av limunum, Rasmus Magnussen við hugskotinum at stuðla átakinum við at hjálpa orðblindum og lesi- og skriviveikum fólkum.

Hetta gjørdi hann, tí hann er sjálvur orðblindur, onkur børn hansara eru tað sama, og Rasmus Magnusen er ein maður, sum væl torir at tosa um hetta. Tað er ikki so løgið, at børnini hava sama brek, tí orðblindni er sera arvaligt.

- Tað ræður fyrst og fremst um at fá broyting í, so orðblindni ikki longur verður tagt burtur. Tað skal fram í ljósið, sigur Rasmus Magnussen.

## Hjálp er at fáa

Hans-Pauli Christiansen heldur tað verður eitt ótrúliga stórt framstig, at tað almenna nú hevur sett undirvísing fyri orðblindum og lesi- og skriviveikum á fíggjarlógina.

Kanningar vísa, at fimm prosent av fólkinum í Føroyum sum í øðrum londum eru orðblind. Við røttu undirvísingini ber væl til at læra tey at lesa og skriva væl.

Átakið, sum nú er byrjað, er fyri ung fólk yvir 14 ár og vaksin fólk.

- Seks kvøldskúlar í Føroyum hava nú undirvísing fyri orðblindum. Tað er ógvuliga gott, at øll lesi- og skriviveik fólk nú kunnu fara í kvøldskúla. Av tí at skúlarnir eru runt landið, kunnu fólkini fáa undirvísing nærindis ella í heimbygdini, og tá ið tað er kvøldskúli, missa tey ikki arbeiðstíð. Tað hevði ikki verið gott, um hetta tilboðið bara var í Havn, sigur Hans-Pauli Christiansen.

Umframt at kvldskúlarnir undirvísa orðblindum, er henda undirvísing eisini á teknisku skúlunum báðum, á Fiskivinnuskúlanum, á Heilsuskúlanum og handilsskúlunum.

Í fjør kom orðblindni fyri fyrstu ferð á fíggjarlógina.